# Still neyðarróp frá tigandi kvinnum

**- Nógvar av teimum kvinnum, ið venda sær til okkara, eru í djúpari neyð og vita ikki síni livandi ráð, sigur Bente Holmgaard, sálar- og familjuviðgeri.**
**Í stívliga eitt ár hevur hon verið leiðari á fosturtøkutelefonini hjá danska felagsskapinum, "Retten til livet".**
**Leygardagin helt hon tríggjar fyrilestrar í Mentanarhúsinum í Fulgafirði, sum allir viðgjørdu ráðgeving í fosturtøkuspurningum**

FOSTURTØKA
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

- Er tað nakar, sum kann siga mær, hvussu tit eru komnar gjøgnum eina fosturtøku, og hvussu tit hava tað aftaná? Eg veit als ikki, hvat eg skal gera. Eg veit, at tað er skeivt av mær at siga so, tá eg eigi tveir deiligar synir, men gævi eg kundi farið frá hesari jørð...

Við hesum orðum endar ein ólukkulig mamma bræv sítt, sum er at finna á heimasíðuni, NetDoktor.dk. Brævið er skrivað 3. august í ár.

Eftir brævinum at døma, er tað maðurin, sum móti hennara vilja vil, at fostrið skal takast.

Neyðarrópið frá hesi navnleysu kvinnu er bert eitt av mongum, frá tigandi kvinnum í svárastu neyð.



*Leygardagin helt Bente Holmgaard tríggjar fyrilestrar í Mentanarhúsinum í Fuglafirði um ráðgeving í samband við fosturtøku. - Tær kvinnur, ið veruliga ynskja fosturtøku, kunnu teljast á aðrari hondini, sigur hon*

*(Mynd: Maria Olsen)*

## Alt ov svárt at tosa um

Reyði tráðurin í fyrilestrunum hjá Bente Holmgaard var at vísa á, hvussu neyðugt tað er, at samfelagið hevur nakað at bjóða teimum kvinnum, sum eru vorðnar við barn í "ótíð".

Í samrøðu við Sosialin sigur hon, at tá kvinnur verða spurdar, hvat tær høvdu gjørt, um tær bara kundu ynskt tað, tær vildu, er svarið næstan altíð, at tær høvdu viljað føtt barnið.

- Tær, ið veruliga ynskja fosturtøku, kunnu teljast á aðrari hondini, sigur hon.

- Vit hoyra lítið og einki til hesar kvinnur, tí hetta er alt ov svárt fyri tær at tosa um, segði Bente Holmgaard í fyrilestri sínum í Mentanarhúsinum leygardagin.

Hon vísti á tann stóra tørvin, kvinnur í slíkum umstøðum hava á einum staði at venda sær, har tær kunnu fáa ráðgeving og hjálp.

Í Føroyum er ikki frí fosturtøka, men hóast tað, finnast kvinnur her heima, sum standa við júst somu trupulleikum, sum kvinnan, ið kærir sína neyð hjá NetDoktor.

## Sjálvboðin ráðgeving

Hóast ein samd trivnaðarnevnd í 1999 heitti á landsstýrið um at styrkja ráðgevandi partin í sambandi við barnsburð, er einki hent á tí økinum enn.

Kvinnur, sum eru í trupulleikum orsaka av barnsburði, kunnu tó venda sær til felagsskapin, Føroya Provita.

Undanfarin ár hevur hesin felagsskapurin fingið 100.000 krónur á fíggjarlógini. Nú almannamál og heilsumál eru skild sundur, er ein konto at finna undir familju- og heilsumálum, sum eitt nú skal stuðla hesum felagsskapi.

Landsstýrismaðurin roknar við, at Føroya Provita í minsta lagi fer at fáa somu játtan, sum árini frammanundan.

Provita er sjálvboðin felagsskapur, sum bjóðar seg fram og veitir ráðgeving til kvinnur, ið eru við barn og umhugsa fosturtøku.

Tað var Provita, sum skipaði fyri evnisdegnum leygardagin.

Føroya Provita hevur tveir almennar fundir um árið. Um várið er ársfundur, og á hvørjum heysti skipar felagið fyri evnisdegi um viðkomandi evnir í samband við fosturtøku.

Føroya Provita hevur um 230 limir. Ynskir tú at vita meiri um felagsskapin, kanst tú fara á heimasíðu teirra, www.provita.fo ella ringja á telefon 456340.

Um 50 - 60 fólk vóru í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har Bente Holmgaard eisini gav áhoyrarunum góð ráð í samband við ráðgeving sum heild.

# Tú ert til kortini

**Norski rithøvundurin, Britt Karin Larsen, ið serstakliga er kend fyri bøkur sínar um sigoynararnar í Noregi, er ein av teimum kvinnum, ið hevur fingið fosturtøku. Britt Karin hevur fingið fleiri virðislønir fyri skaldskap sín.**
**Bók hennara, "Du er likevel til", er ein opinskárað lýsing av tí óvissu og sorg, sum kemur í kjalarvørrinum á eini fosturtøku**

BÓKAUMMÆLI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Nógv verður í hesum døgum kjakast um fosturtøku.

Summi vilja, at lóg skal setast í gildi í Føroyum, sum gevur kvinnum loyvi at fáa fosturtøku, tá tær ynskja tað.

Onnur stríðast hart ímóti fríari fosturtøku.

Men sjáldan hoyra vit, hvussu kvinnur hava tað, sum koma í slíka støðu, at tær gjørdu av at taka eitt fostur.

## Tómir armar

*"Tað snýr seg um at steðga einari lívsleið.*

*Summi nýta onnur orð um tað.*

*Eg var við og gekk í kravgongu fyri hesari lógini, sum skuldi geva mær størri fríheit. Sum skuldi geva mær møguleika at sleppa frá einum barni, sum ikki var ætlað - og møguleikanum at føla ta sorg, eg nú kenni."*

Soleiðis skrivar Britt Karin Larsen í bók síni, "Du er likevel til".

Bókin er eitt bræv til barn hennara, sum ongantíð varð borið í heim.

Bókin byrjar við, at Britt Karin er á ferð í Jerusalem. Inni á skrivstovuni hjá Palestinian Human Rigth, situr hon og lesur deyðslistarnar:

*"Imad Hamdi Abu Asi, 15 dagar, deyður av táragassi.*

*Fatheh Al - Quidri, 4 dagar, deyður av táragassi.*




*Við hvørjum rætti verða hesi børn dripin? Enntá ófødd børn láta lív undir gassálopunum, skrivar hon víðari.*

*Eg rópti eftir rættvísi fyri hini.*

*Men hvønn møguleika fekk tú?*

*Tað vóru ikki hermenn og táragassbumbur, ið gjørdu enda á tínum lívsljósi...*

*Vápnið var eitt útfyllingarblað, eg skrivaði undir uppá.*

*Ein umsókn um lógliga fosturtøku.*

*Hvønn ákæri eg nú?"*

## Valið er títt

Sum so nógvar aðrar kvinnur, fekk Britt Karin aftur og aftur at vita, at valið var hennara. Men í bókini kemur týðiliga fram, at hon varð trýst til fosturtøku av vantandi stuðuli frá manni sínum.

Bókin er skrivað eitt ár eftir, at Britt Karin hevði fingið fosturtøku, og rúmar ófatiliga stórari sorg, longsli og sálarkvøl.

Á donskum hevur bókin heitið, "Du er alligevel til" og er givin út á Hans Reitzels Forlagi í 1990.

Bókin fæst til láns á bókasavninum hjá Føroya Provita, telefon, 455146.

Britt Karin Larsen hevur fingið fleiri virðislønir fyri skaldskap sín, eitt nú fekk hon í 1993 Gyldendals legatið.



# Lóggávan er trupulleikin




*Bæði Bjørn á Heygum, advokatur, og Jóhan Joensen, reiðari á Arctic Viking standa spyrjandi, nú politikkur er komin í málið um umstríddu útflaggingina. Bjørn á Heygum heldur, at stóri trupulleikin er ófullfíggjaða lóggávan um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan*

*Mynd: Savnsmynd*

**Bjørn á Heygum, advokatur og fyrrverandi løgtingslimur, ið var við til samtykkja lógina um umlegging av lánum, heldur, at stóri trupulleikin í málinum um Arctic Viking liggur í lóggávuni og ikki í leiklutinum hjá reiðarínum. Hann skilir ikki, at politikkur er komin í málið, tí P/F Líðin hevur hildið lóggávuna. Reiðarin á Arctic Viking, Jóhan Joensen, stendur eisini spyrjandi**

ARCTIC VIKING-MÁLIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Málið um útflaggingina hjá rækjuskipinum, Arctic Viking, hevur aftur fingið nýggj bein at ganga á. Í gjár kom fram í SVF og ÚF, at umstrídda málið skal nú viðgerast á politiskum stigi. Seinastu vikurnar hevur mikil orðadráttur tikið seg upp um umsóknina hjá P/F Líðini um at sleppa at flagga út undir litaviskum flaggi.

Ónøgd er um, at landskassin í síni tíð veitti reiðarínum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán, so Arctic Viking ikki fór av knóranum. Fá ár eftir lánið frá landskassanum hava eigararnir goldið sær sjálvum vinningsbýti á góðar 2. mio. krónur. Stórt spurnartekin hevur verið sett við, hvussu moralskt røtt avgerðin um vinningsbýtinum var.

Trýst varð lagt á politiska myndugleikan at gera nakað við málið. Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, legði málið fyri samgonguna. Lítla samgonga umrøddi málið fríggjadagin, og tá varð avrátt, at málið um útflaggingina skal viðgerast politiskt.

Fiskimálaráðið hevði annars tikið støðu í málinum, og mælt til, at Arctic Viking fekk loyvi at flagga út í fyribils tvey ár. Umlagda avdráttar- og rentfría lánið hjá skipinum skuldi hesi árini standa í stað.

## Skelkaður

Reiðarin á Arctic Viking, Jóhan Joensen, stendur fullkomiliga spyrjandi eftir, at tað nú er greitt, at umsóknin um útflagging ikki endaliga kann svarast fyrr, enn hon er viðgjørd politiskt.

– Vit hava hildið okkum til galdandi lóggávu á økinum, og tí skelkar tað meg, at málið nú skal á politiskt stig. Eg ivist eisini stórliga í, um mannagongdin hjá samgonguni er loyvd. Vit hava sett ein sakførara á málið fyri at kanna um røtt mannagongd er fylgd, sigur Jóhan Joensen.

Spurdur, um hann metir, at rættartrygdin er í vanda, svarar reiðarin á Arctic Viking, at hann í hesum døgum setir stórt spurnartekin við rættartrygdina, tí reiðariíð hevur alla tíð handlað innanfyri galdandi lóggávu, sum hann málber seg.

Samgongan er eftir øllum at døma á einum máli um, at lógin um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan eigur at verða broytt. Løgtingslimir, ið vóru við til at samtykkja lógina í 1997 hava alment boðað frá, at lógin í sínari var gjørd í skundi, og at hon átti at verið betri úr hondum greidd.

Lógin um umlegging av lánum verður av nógvum mett at vera ófullfíggjað. Hon tekur millum annað ikki hædd fyri útflagging, og tí eru nógvar røddir frammi um, at lógin treingir harðliga til ábøtur.

Reiðarin á Arctic Viking, Jóhan Joensen, sigur seg ongar trupulleikar hava av, at lógin verður broytt. Hann leggur tó dent á, at umsóknin til útflagging hjá Arctic Viking eigur eftir hansara tykki at verða viðgjørd eftir gomlu lóggávuni, tí umsóknin varð send, áðrenn samgongan metti, at neyðugt var við nýggjari lóggávu.

## Lógin er trupulleikin

Bjørn á Heygum, advokatur, var í síni tíð við til at samtykkja lógina um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan. Hann stendur eins og Jóhan Joensen spyrjandi eftir, at politikkur er komin upp í málið.

– Tað er eitt sindur løgið, at málið um Arctic Viking skuldi gerast ein politiskur spurningur, tí eftir galdandi lóggávu er tað er umsitingin í Fiskimálaráðnum, ið eigur endaligu avgerðina í málinum, sigur Bjørn á Heygum.

Bjørn á Heygum hevur alment víst á, at hann heldur, at núverandi lóggáva er stak óheppin, tí hon er ófullfíggjað.

– Tað er einki at dylja yvir, at núverandi lóg er ófullfíggjað, og at hon ikki tekur fyrilit fyri øllum økjunum. Eitt er útflagging, og tí er møguligt, at lógin skal endurskoðast og tiltrongdar ábøtur fremjast, so hon verður meira fullfíggjað, greiðir Bjørn á Heygum frá.

Fyrrverandi sambandstingmaðurin metir, at lógin átti í nógv størri mun at røkt áhugamálinum hjá landskassanum, enn hon ger í núverandi líki.

Bjørn á Heygum leggur dent á, at stóri trupulleikin í málinum um Arctic Viking er lóggávan og ikki leiklutinum hjá reiðarínum, tí tað hevur hildið seg til galdandi lóggávu.

- Feilurin liggur ikki hjá Arctic Viking, men í sjálvari lógini. Reiðaríið eigur at disponera yvir núverandi lóggávu, og eftir henni er einki, ið forðar teimum at flagga út. Hvørjar broytingar verða framdar við nýggju lóggávuni er ilt at meta um, men hugsast kann, at møguleikarnir hjá Arctic Viking verða skerdir við nýggju lóggávuni, og tað eigur ikki at koma fyri, sigur Bjørn á Heygum.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum boðaði í gjár frá, at væntandi verður uppskotið um lógarbroytingina lagt fram í november mánað. Úrskurðurin í løgtinginum fer eftir øllum at døma at avgera lagnuna hjá Arctic Viking í umstridda málinum um útflagging.